# Trampolin er stóra hittið



BR-Leikur í Havn er veruliga komið inn í summarsøluna. Øll vøra, sum kann nýtast úti, selur sera væl. Tað, sum er best dámt nú, eru tær stóru trampolinirnar. Tú kanst hava tær standandi uttanfyri, og børnini kunnu hugna sær uttanfyri í góðveðrinum. Tað er ikki óvanligt at síggja slíkar í havanum hjá fólki.

Skateboard selja eisini væl. Skateboarding er veruliga við at fóta sær sum ein ítrótt. Tað eru fleiri, sum ganga sera høgt uppí tað, og møguleiki er nú at venja seg á rampum.

Rulluskoytur selja væl um summarið. Tað er stuttligt at standa á rulluskoytum, og so er tað eisini eitt sera hent flutningstól í tættari ferðslu.

Annars verða nógvar vatnbyrsur seldar til skúlanæmingar, sum skulu halda síðsta skúladag.

BR-Leikur í Havn er limur í BR-ketuni, sum hevur handlar í øllum Norðanlondunum, og uppfyllir allar treytir hjá BR-ketuni.

– Tað er ein stórur fyrimunur fyri okkum at vera limir í ketuni. Vit fáa prístrygd og góðskutrygd og kunnu tí geva okkara kundum eina bíligari og betri vøru, sigur Kristianna Lamhauge.




















